# Yvirtøkan til gagns fyri kristnilívið

**- Tað skal vera mín vón, at fólkakirkjan og eisini hinar kristnu samkomurnar í okkara landi kunnu vera bulvirki og ein vernd soleiðis, at vit sum fólk og einstaklingar kunnu halda fast við tann arvin, sum vit fingu frá forfedrum okkara, og at evangeliið kann røkka víðari út og djúpari niður í hjørtuni segði Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður m.a. á hátíðarhaldi í Norðurlandahúsinum sunnudagin. Vit prenta røðu hansara:**



*Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður og Berthel Hårder, ráðharri skriva undir avtaluna*

Í dag – ólavsøkudag 2007 – hava vit skrivað enn ein kapittul í eini drúgvari søgu, nú vit formliga eru komin á mál við yvirtøkuni av fólkakirkjuni. Fyrrapartin vóru vit á fyrsta sinni til gudstænastu í tí yvirtiknu kirkjuni, og hóast kirkjan framvegis er tann sama – so er hon nú, saman við øðrum trúarsamfeløgum, heilt og fult komin undir føroyskt málsræði.

Gudstænastan – áðrenn tingið verður sett, tá ið løgting, landsstýri, biskupur, prestar og hægstu embætismenn ganga skrúðgongu úr tinginum í dómkirkjuna og aftur í tingi – er ein vøkur og sera hátíðarlig hending og nemur við okkurt djúpt í okkara hjørtum.

Ólavsøkuskrúðgongan sýnir tað gamla sambandið ímillum ting og kirkju, ímillum tað verðsliga valdið og átrúnaðin, kristindómin – ein ásannan av og ein áminning um, at tað er ein hægri makt til – eitt vald, sum er hægri enn okkara.

Og hugsa vit um okkara forfedrar – og tað gera vit ein slíkan merkisdag – so vita vit, at okkara gamla mentan og siðvenja á mangan hátt hevur verið gjøgnumseyrað av hesi ásannan, hesum sama gudsótta. Okkara fólk hevur verið ómetaliga fastankrað í kristindóminum – í teimum kristnu virðunum.

Hetta lýsir Hans Andreas Djurhuus eisini so væl í tí kenda sanginum, ”Tit, sum í fjøru fóru”, sum hann yrkti í 1934, har hann sigur í síðsta ørindi:

*Tað vóru ikki hjálmar*
*og ikki lúðraljóð,*
*tað vóru tykkar sálmar*
*og tað, ið tykkum bjó,*
*sum gjørdi hesar heiðar*
*og eyr og hagasand*
*til gróðrarbúnar teigar.*
*Tit eiga hetta land!*

Jú, víst eru tað sálmarnir, Guds orð og tey andligu virðini, sum á so mangan hátt hava bygt okkara kæra Føroya land.

\- - -

Vit hava nú undirskrivað eina avtalu um samstarv millum Mentamálaráðið og danska kirkjumálaráðið. Samstarv okkara við Kirkjumálaráðið hevur verið sera gott, og henda avtalan tryggjar teir formligu karmarnar um eitt framhaldandi samstarv. Vit hava her gjørt avtalu um m.a. framhaldandi atgongd til útbúgving og eftirútbúgving fyri prestar og onnur, um samstarv millum biskuparnar, um at góðkenna trúarsamfeløg og um eina samstarvsnevnd at tryggja framtíðar samstarv.

Tað er tó ikki henda samstarvsavtalan, ið fremur yvirtøkuna. Ta formligu fortreytina fyri yvirtøkuna skaptu vit, tá ið vit 20. apríl á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn undirskrivaðu eina felags yvirlýsing í sambandi við yvirtøku av málsøkjunum “fólkakirkjan” og “onnur trúarsamfeløg”, meðan eitt samt løgting framdi yvirtøkuna, tá ið tað 1. juni í ár samtykti yvirtøkulógina, sum er komin í gildi í dag.

Avtalan og nevnda yvirlýsing eru gjørdar millum tvær tjóðir í góðari semju og er eitt gott dømi um, hvussu ein á fólkaræðiligan hátt í sátt og semju loysir stórar spurningar.

Eg skal ikki fara nógv inn á tað søguliga her í dag, men bara nevna, at yvirtøkan av fólkakirkjuni er ein liður í einari natúrligari menning av okkara samfelag og eini gongd fram ímóti størri sjálvstýri, har vit føroyingar taka fulla ábyrgd av okkara landi.

Arbeiðið hevur verið drúgt og hevur kravt stóra orku so mangastaðni – í Mentamálaráðnum, í tí politisku skipanini, í danska kirkjumálaráðnum og í tí kirkjuliga umhvørvinum her hjá okkum. Og eg vil fegin nýta hetta høvið at takka øllum tykkum mongu, ið hava arbeitt konstruktivt og tolið við hesum stóra máli.

Vit vita, at semja er ikki um øll kirkjumál. Men tað er gleðiligt, at tað bar til at standa saman um at fremja sjálva yvirtøkuna í semju í løgtinginum. Hetta vil eg fegin takka tí politiska fylgibólkinum, mentanarnevndini og tingfólkum øllum fyri.

Danska kirkjumálaráðið og kirkjumálaráðharrin, sum er staddur her í dag, skulu eiga eina hjartans tøkk, bæði fyri samstarvið í sambandi við sjálva yvirtøkufyrireikingina, og samstarv og konstruktivt viðspæl, nú vit gera okkara egnu umsiting av økinum – og takk fyri, at tygum, Bertel Haarder, vildu hátíðarhalda yvirtøkuna saman við okkum!

Og ikki minst fari eg at takka tí kirkjuliga fylgibólkinum, kirjuráðum, umsitingini í Mentamálaráðnum og einstaklingum, ið hava lagt orku í at viðgera innihaldsligar spurningar saman við okkum og koma við viðmerkingum, soleiðis at fyrireikingarnar kundu blíva so góðar, sum til bar.

\- - -

Yvirtøkan av fólkakirkjuni er eitt sera stórt og týdningarmikið mál fyri ta føroysku tjóðina og nemur við sterkar kenslur, tí kirkjan er jú ein so integreraður partur av tí føroyska samleikanum, og tað skal vera mín vón, at yvirtøkan fer at vera til gagns fyri kristnilívið í Føroyum, fyri okkum sum eitt fólk – ein tjóð, ið hevur vilja og evni at taka ábyrgd á øllum økjum.

Eg nevndi at byrja við tey kristnu virðini, sum á so mangan hátt hava merkt okkara samfelag. Vit liva í eini tíð, har heimurin gerst minni og minni, og ávirkanin uttanífrá økist í hvørjum – bæði við góðum og ringum. Hyggja vit at vesturheiminum í dag, so síggja vit, at sekulariseringin, verðsliggeringin, er stór, og hon ger seg eisini galdandi her hjá okkum.

Tað skal vera mín vón, at fólkakirkjan og eisini hinar kristnu samkomurnar í okkara landi kunnu vera bulvirki og ein vernd soleiðis, at vit sum fólk og einstaklingar kunnu halda fast við tann arvin, sum vit fingu frá forfedrum okkara, og at evangeliið kann røkka víðari út og djúpari niður í hjørtuni.

Lýða vit Gud og lóg og rætt, (syngur Jóan Petur uppi í Trøð í Kvívík)

*og dyrka vit vísdóms anda,*
*tá birtist í Føroyum ljósari tíð*
*at skína frá strond til stranda.*
*Tá blómar tann kvistur,*
*her útrann av norrønum*
*runni.*

Og Jóannes Patursson sigur í sínum kenda sangi, ”Boðar tú til allar tjóðir”:

*Um nú nýggjar øldir líða,*
*halt á somu leið várt starv,*
*at vit ikki lata svíða*
*dugnaloysi til hin arv,*
*sum vit ervdu fedrum av,*
*tá skal lyftið, sum tú gav,*
*allan aldur Føroyum tryggja*
*føroyingunum her at byggja.*

Hetta lyftið, sum Jóannes Patursson sipar til, er tað lyftið, sum Gud hevur givið okkum, at fylgja vit hansara boðum, so skal gangast okkum og landi okkara væl.

Eg fari at enda enn einaferð at takka øllum, sum hava verið við í yvirtøkuarbeiðinum so ella so, og tað er mítt hægsta ynski, at Guds vælsignilsi skal hvíla yvir hesum verki og yvir Føroyum og hinum Norðurlondunum, sum eru umboðað her í dag.







*Stúgvandi fult varð í Norðurlandahúsinum til hátíðarløtuna. Tónleikur og kórsangur settu sín serstaka dám á*